# Hugskotið um samfelagsstrateg


- *Tað, sum eg serliga sakni í yvirskriftunum hjá landsstýrinum til evnisdagarnar, er, at har stendur einki um gransking og útbúgving, sigur Heidi Petersen, løgtingskvinna, sum fýlist á, at landsstýrið ikki tekur andstøðuna við í viðgerðina av virkisætlanini, "Strategi fyri framtíð Føroya"*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Men andstøðan átti avgjørt at verið tikin upp á ráð, tá ið ein so langsiktað og týdningarmikil ætlan fyri framtíðina skal setast út í kortið. Allir partar áttu sjálvsagt at verið við, soleiðis at vit kundu komið við okkara positiva íkasti, sigur Heidi Petersen, løgtingskvinna**

FRAMTÍÐ FØROYA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur tosað við Heidi Petersen, løgtingskvinnu og framsøgufólk Tjóðveldisfloksins í fiskivinnumálum, um ætlaninar hjá landsstýrinum at gera eina "Strategi fyri framtíð Føroya", sum landsstýrið kallar tað. Saman við Torbirni Jacobsen, løgtingsmanni, er hon eisini framsøgufólk Tjóðveldisfloksins í vinnumálum.

## Andstøðan ikki við

Løgtingskvinnan heldur, at hugskotið hjá landsstýrinum er bæði gott og neyðugt, men hon heldur, at andstøðan avgjørt átti at verið tikin upp á ráð, tá ið ein so langsiktað og týdningarmikil ætlan fyri Føroyar skal setast út í kortið.

– Sambært landsstýrinum er málið at gera eina virkisætlan, har málið er, at Føroyar í ár 2015 skulu teljast millum heimsins fremstu tjóðir.

Heidi vísir á, at henni kunnugt er andstøðan ikki tikin við í hetta arbeiði hjá landsstýrinum, og sum framsøgufólk á tingi í fiskivinnumálum og vinnumálum er hon ikki boðsend til teir evnisdagar, sum landsstýrið hevur skipað fyri í samband við hetta arbeiði.


- *Eg haldi, at vit í stóran mun eru eftirbátur í framleiðslu av vørum, sum keyparin vil hava – og vil rinda góðan prís fyri. Vit hava lyndi til ikki at tillaga okkum, fyrr enn vit veruliga noyðast, og tað er spell, heldur Heidi Petersen, løgtingskvinna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

– Eg havi bara hoyrt løgmann í útvarpinum tosað um hesa ætlan. Havi roynt at finna fram til tilfar sum lýsir ætlanina, men tað hevur ikki eydnast. Jú, eg haldi, at tað er ógvuliga óheppið, at vit í andstøðuni ikki eru við, tá ið langtíðarstrategiir fyri Føroyar skulu setast út í kortið.

Hon vísir á, at tað er ikki vist, at samgongan, sum nú situr við landsins leiðslu, verður sitandi – heilt fram til 2015.

– Tað kunnu vit ikki rokna við, og tí hevði eg hildið tað verið rætt av landsstýrinum at havt allar partar við í hesum arbeiði, soleiðis at vit kundu komið við okkara positiva íkasti.

## Alheimsgerðin

Heidi Petersen ynskir eisini at gera viðmerkingar til nøkur av ítøkiligu evnunum, sum landsstýrið hevur havt til viðgerðar á evnisdøgunum, sum verið hava – og teimum, sum sambært ætlanini liggja fyri framman.

– Fyrstu evnisdagarnir høvdu yvirskriftina, "Alheimsgerð - møguleiki og hóttan", og eg haldi, at hetta er eitt ógvuliga áhugavert og viðkomandi evni at taka upp.

Um yvirskriftina til næsta umfar í evnisdøgunum, "Eitt framtíðar oljuvinnusamfelag og útjaðarapolitikkur", heldur hon, at sjálvandi skal oljuvinnusamfelagið takast við, men hon dugir ikki rættiliga at síggja, hví hetta málið verður tengt at útjaðarapolitikkinum.

– Hetta haldi eg virkar eitt sindur óveruligt, sigur hon.

## Vælferð og búskapur

Løgtingskvinnan heldur, at evnið, "Vælferðin og búskapur", sjálvsagt eisini er eitt áhugavert evni, men hon vildi fegin fingið at vita á hvørjum økjum, landsstýrið ætlar, at Føroyar skulu teljast millum